# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 7. januar 2010

## Alina aftur í Tjaldri

**Alina Olaru, sum í fjør var týðandi partur av FM-liðnum hjá Tjaldri, verður nú aftur at síggja í felagnum**




Jákup Mørk

Seinnu árini hevur Alina verið ein av allar fremstu spælarunum í føroyskum kvinnuhondbólti, men tá hon gjørdist við barn í fjør, steðgaði hon við hondbóltinum, so skjótt sum FM-heitið við Tjaldri varð vunnið.

Nú er hon so smátt byrjað at venja aftur, og í Tjaldri ivast tey ikki í, at hon kann gerast ein sera góður fongur hjá liðnum.

Tjaldur hevði við ársbyrjan fýra útlendingar á liðnum, og tað er bert loyvi at nýta tríggjar í hvørjum dysti.

Marinela Patru er tó farin av landinum, og Adea Burcea er fyri tað mesta á beinkinum, meðan Guðrun í Lágabø stendur í málinum, og tí verður ikki roknað við, at tilgongdin av Alinu Olaru skapar nakrar trupulleikar í so máta.

## Litavi til H71

**Karolis Dainys er í hesum døgum til royndarvenjingar hjá H71. Tað skrivar heimasíðan hjá Kringvarpinum.**




Uni Holm Johannesen

Kári Nielsen, venjari, sigur við heimasíðuna, at 21 ára gamli Dainys, sum er ættaður úr Litava, væntandi verður knýttur at hópinum í nærmastu framtíð.

- Hann er stórur og sterkur og skal fyrst og fremst styrkja um verjuna hjá okkum, sum hevur verið svikalig í seinastuni. Harnæst fer hann vónandi at geva okkum fleiri streingir at spæla á, tá vit fara í álop. Higartil hevur ov nógv hingið á ávísum leikarum, sigur Kári Nielsen, venjari hjá H71, við kringvarp.fo.

Verandi føroyameistararnir eru í løtuni á fjórða plássinum - eitt stig frá finaluplássi.



VÍF vann sær tvey sera týdningarmikil stig, tá tær í gjárkvøldið vunnu heimadystin móti Neistanum

Mynd: Álvur Haraldsen

### Fakta

**VÍF-Neistin 28-25 (11-11)**
**10 min:** 3-4
**20 min:** 6-9
**40 min:** 16-17
**50 min:** 21-22
**Málskjúttar**
**VÍF:** Liljan Djurhuus 6(2), Elisa Leo, Finngerð Jensen 4, Tóra Seloy 4, Heidi Joensen 4, Agnas Olsen 2, Katrin Christophersen 1, Linda Davidsen 1, Halla Midjord 1
**Neistin:** Birita Wardum 6, Lina Andriulyte 6, Anja Heinadóttir 4, Katrin á Neystabø 3, Rakul Augustinussen (1)3, Jacklin Durhuus 2, Unn Kragesteen 1
**Brotskøst:** VÍF 2, Neistin 2
**Útvísingar:** Neistin 2
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Birgir Sondum

### VÍF-Neistin 28-25 (11-11):

## VÍF skapti fyrstu sensatiónina

**Eftir eitt kappingaraár, har mest sum øll úrslit hava verið, sum roknast kundi við, skaptu kvinnurnar hjá VÍF sína sensatión, tá tær á heimavølli bastu Neistanum**




Jákup Mørk

Spenningurin í Sunset-deildini í ár hevur fyri tað nógva verið í botninum, har VÍF og VB hava dystast.

Sum úrslitini hava verið, so hevur eingin skala tey bæði oddaliðini, sum trygt stýra móti finaluni. Eins trygt hevur tað verið, at Neistin hevur bast hinum trimum liðunum, og at StÍF hevur bast teimum báðum niðastu.

Men tann raðfylgjan skalaðist í gjár. Eisini hóast tað ikki akkurát var tað, sum lá í luftini fyrstu løtuna.

Tá hótti Neistin nevnliga við at renna undan heimaliðnum, men undan steðginum kom VÍF kortini upp á javnt.

Og tær gulu hildu fast allan seinna hálvleik. Tað var fyri tað nógva Neistin, sum hevði munin, men tá seinastu fimm minuttirnir stóðu fyri framman, helt VÍF høvdið kaldari. Og við at vinna hesa løtuna 5-1, avgjørdu tær dystin. Og við hesum vunnu tær seg upp á fýra stig, meðan VB framvegis er niðast við tveimum stigum.

Talan var samstundis um fyrsta dystin hjá Birgiri Hansen við stýrisvølin hjá Neistakvinnum. Og í so máta var talan neyvan um nakra ynskisbyrjan hjá honum.

## Landsliðið klárt til Cypros

**Landsliðsvenjararnir í hondbólti Dia Midjord og Kári Nielsen hava tikið út sekstan spælarar til HM-undandystirnar á Kypros næsta vikuskifti**




Jákup Mørk

Landsliðið spælir tríggjar undandystir á Kypros. Spælt verður ímóti Sveis fríggjadagin 15. januar, ímóti Hvítarusslandi leygardagin 16. januar, og ímóti vertunum av Kypros sunnudagin 17. januar.

Landsliðið fer til Keypmannahavnar mikudagin 13. januar og víðari á Kypros dagin eftir. Landsliðið kemur heim aftur mánakvøldið 18. januar.

### Teir 16 spælararnir eru:

**Neistin:** Heini Hanusarson, Finnur Hansson, Tróndur Kragesteen, Carl Herup Olsen og Ári E Dam.
**H71:** Janus Sørensen, Dánjal Tórgarð, Esbern Patursson, Poul Kjartan Dam og Levi Nybo.
**Kyndil:** Bárður Johannesen, Hans Áki Dal-Christiansen og Tummas Pauli Hanusarson.
**VÍF:** Sámal Joensen og Bjarti Hansen.
**KÍF:** Niklas Reginsson.



Manslandsliðið í hondbólti skal um eina viku spæla tríggjar dystir á Cypros